

# Nógv hugna sær á Nólsoyar Pálstorginum

Í góðveðrinum í eins og í summar sum heild hava nógv fólk hugna sær á torginum kring Nólsoyar Páll í Vágsbotni í Havn. Serliga síðani býráðið setti upp borð og beinkir upp, hava nógv fólk savnast á staðnum. Sum myndin vísir, eru tað eisini nógv ferðafólk, sum njóta ein bita ella bara stytta sær stundir har. Kafe Vágsbotn er eisini væl vitjað – og vit kunnu higani úr Miðlahúsinum eygleiða, hvussu skjótt fólk savnast har, so skjótt sólargeislarnir hita her í sera veðurgóða hjartanum í Havnini, Vágsbotni.

# 172 listaverk í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku

**Aftur í ár, fyri níggjundu ferð á rað, skipar Lions Club Tórshavn fyri listaframsýning á ólavsøku, har kend og minni kend listafólk sýna fram listaverk. Allur ágóðin fer til vælgerandi endamál. Framsýningin er opin sunnudagin og báðar ólavsøkudagarnar.**

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*



Hesa ferð sýna tilsamans 41 listafólk fram tilsamans 172 listaverk á stóru listaframsýningini, sum Lions Club Tórshavn skipar fyri í Müllers Pakkhúsi. Talan er sum vanligt um eina søluframsýning, hvørs endamál er at útvega pening til vælgerandi endamál, og allur ágóðin av bæði listaverks-ogatgongumerkjasølu fer til slík endamál.

Sigast kann av sonnum, at framsýningin umboðar myndlist í orðsins breiðasta týdningi, tí við á framsýningini eru nógvir olju- og akrylmálningar, umframt vatnlitsmyndir, tekningar av ymsum slagi og skulpturar. Breiddin í skaranum av listafólkum er somuleiðis stór, tí talan er bæði um kend og minni kend listafólk, ið sýna fram verk síni.

Ágóðin av tí arbeiði, sum Lions Club Tórshavn ger, fer altíð til okkurt vælgerandi endamál, og so er eisini hesa ferð. Avgerð er tikin um, at pengarnir í ár skulu fara til eina stóra ráðstevnu um orðblindni á Hotel Føroyum tann 12. september, sum Lions Club Tórshavn eisini hevur tikið stig til.

## Málningur at vinna

Tað kostar 50 krónur at koma inn á framsýningina í Müllers Pakkhúsi, og øll vitjandi fáa útflýggjaða eina skrá yvir framsýningina. Á hvørja skrá er prentað eitt nummar, og tá framsýningin endar ólavsøkukvøld, verður drigið millum allar skráirnar um ein málning, sum Øssur Mohr í Fuglafirði hevur málað.

Listaframsýningin hesa ferð er tann níggjunda í røðini, og síðani 2000 hevur hon verið fastur táttur í mongu mentanartilboðunum í høvuðsstaðnum á ólavsøku. Seinnu árini hava alsamt fleiri ólavsøkugestir valt at lagt leiðina fram við Müllers Pakkhúsi á ólavsøku, og tað vóna fyrireikararnir eisini, at mong gera hesa ferð.

Somuleiðis vil Lions Club Tórshavn takka fyri góðan stuðul frá Tórshavnar býráð, sum leggur høli til framsýningina, Tryggingarfelagnum Føroyar, sum tryggjar framsýningina og stuðlar á annan hátt, og ikki minst teimum mongu listafólkunum, sum við sínum verkum gera framsýningina til tað, hon er.

Framsýningin er opin sunnudagin frá klokkan 14 til 18, og ólavsøkuaftan og ólavsøkudag er opið frá klokkan 14 til 20.



# Linda Andrews gevur út nýggja fløgu

**Linda Andreasen, havnargentan sum hevur búð tey seinastu 13 árini í Danmark, gevur út fløguna "Revelation".**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

"Tað var upp á tíðina" vilja mong siga, tí Linda hevur verið sera virkin innanfyri tónleikaheimin, og hevur arbeitt í eitt nú Danmark, Svøríki og Onglandi

Í Føroyum er Linda sera kend innanfyri tann andaliga tónleikaheimin, og kanska er sangurin "Nú eg ásjón tína søki" á fløguni "Vit kunngera Jesus" mest kendur, og sera nógv spældur.

Uttanlands hevur hon verið sera virkin, og hevur sungið saman við fleiri kendum sangarum og bólkum, millum annað Carolu, James Sampson, Creamy, Johnny Logan, Sash og Soap.

Tey seinastu trý- fýra árini hevur Linda verið kórleiðari á fimm ymiskum gospelkórum: Gentofte Gospel, Glostrup Gospel, Copenhagen Gospel Singers, Junior Gospel Singers og Gospelkidz. Umframt hettar heldur Linda eisini Gospel Workshops og Teambuildings fyri virkir og kór, og er hon skjótt liðug sum Vocal Coach á 3 ára útbúgvingini hjá Cathrinu Sadolin.

Relevation er so hennara fyrsta solo fløga, har hon syngur 10 enskar sangir. Hetta eru sangir sum hava havt serligan týdning fyri Lindu á hennara ungdómsárum. Tónleikastílurin er sera fjølbroyttur og her er okkurt fyri øll.

Linda hevur eina sera sterka rødd, og á teimum stillu sangunum rakar hon ein beint í hjartað og setur harvið eitt nýtt navn á tann føroyska stjørnuhimmalin, sum sagt verður í tíðindaskrivi.

Serliga kann nevnast Via Dolorosa og Breath Of Heaven.

Linda Andrews kann upplivast live á Summarfestivalinum hóskvøldið tann 7. juli kl. 21.00 við einum sera kendum bólki, har hon m.a. hevur tann fantastiska og sera kenda danska basspælaran Lars Danielsson afturat sær!

Fløgan fæst kring landið. Eisini ber til at keypa fløguna á internetinum: á heimasíðuni hjá GJAMMA www.gjamma.com, sum sendir ókeypis kring alt landið.

# FAROE 5 konsert í tjaldinum ólavsøkuaftan

**Nú fáa føroyingar høvi til at hoyra føroysku songkvinnurnar í FAROE 5. Tær hava nevniliga konsert í ólavsøkutjaldinum í kommunuskúlagarðinum 28. juli kl. 20.00.**

GENTUBÓLKUR
*Tíðindaskriv*



*Frá vinstru: Jónvá Ellingsgaard, Vígdis Fjallstein, Ragnhild Dam, Lillian Dalsgaard og Asta Højgaard*

Fyrsta stakfløgan við bólkinum kom út tann 5. juni, og sangirnir á stakfløguni hava higartil fingið sera góða móttøku. Heitislagið Bara 1 Spæl hevur verið nummar 1 á 15 Teim Bestu, og næsti sangurin, Tú fert altíð at verða har, er eisini nógv spældur.

Hesir verða sjálvandi á skránni ólavsøkuaftan, saman við fleiri av nýggju løgunum, sum verða á komandi fløguni, ið verður givin út í heyst. Á fløguni verða bæði enskir og føroyskir sangir, og stílurin er nýmótans, melodiskur poppur.

Umframt FAROE 5 fer ungi, evnaríki rapparin sangarin og sangskrivarin Thor Simonsen við bólki at framføra nakrar av sínum nýggju sangum, eins og dansarar úr eysturoynni fara at upptraðka.

Hetta er fyrsta tiltakið, sum tær í FAROE 5 sjálvar skipa fyri, og genturnar vóna sjálvandi, at fleiri vilja nýta høvi til at halda Ólavsøku saman við teimum.

Konsertin verður í tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum Ólavsøkuaftan kl. 20.00.